## Hverafuglar í Fríðrikskirkjuni

Íslendski býurin, Hveragerði, er vinarbýur hjá Nes kommunu, og fyri einum ári síðani var Kirkjukórið í Fríðrikskirkjuni á konsertferð í Hveragerði. Nú er eitt kór úr Hveragerði so komi á vitjan á Toftum. Kórið, sum kallast Hverafuglar, er mannað við pensionistum í Íslandi, og tað fer at hava konsert í Fríðrikskirkjuni týskvøldið. Konsertin byrjar kl. 20, og luttakarar verða Hverafuglar og Kirkjukórið í Fríðrikskirkjuni á Toftum. Ferðaleiðarin hjá íslendkska kórinum, David Samuelsson, sum er hálvur føroyingur, fer eisini at luttaka við solosangi.



## Tíðindafólk hjá DR í verkfall

Danska kringvarpið, Danmarks Radio, hevur gjørt eina spariætlan, har tey skulu spara 300 milliónir kr. Av hesi orsøk eru øll tíðindafólkini hjá Danmarks Radio farin í verkfall, tí tey mótmæla spariætlanini, sum hevur gjørt, at fleiri starvsfólk eru søgd úr starvi. Starvsfólkini valdu øll at fara til hús, eftir eitt stóran fund í DR býnum í morgun, og tey møtast aftur kl. 9 í morgin árini danska tíð. Arbeiðssteðgurin er íkomin av uppsøgnum sum er ein fylgja av, at alt, alt ov nógvir pengar eru nýttir í samband við stóra DR býin.

# Kapping noyðir leiðslu



*Hølisumstøðurnar á Business-Institiut í eru sera góðar. Undirvíst verður í einum av mest søguligu fundarrúmum í Aalborg*



**- Skapanarevni og vitan eru týdningarmesta tilfeingið í framtíðar handilsskapi. Hugtakið "broytingarleiðsla" kemur at spæla ein avgerandi leiklut, hvussu leiðslurnar megna at loysa komandi avbjóðingar. Tað sigur Finnur Sivertsen, búskaparfrøðingur, ið júst hevur lokið leiðsluútbúgvingina "top governance" á Aalborg Business-Institute**

ÚTBÚGVING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Finnur Sivertsen, ið starvast sum grannskoðari og ráðgevi, er helst best kendur fyri portalin www.business-line.fo, sum hann eigur og stjórnar.

Herfyri tók hann eina serliga "toppleiðsluútbúgving" á Aalborg Business-Institute.

Ein av góðveðursdøgunum settu vit honum stevnu í Klaksvík, og beint eftir samrøðuna fór hann á flot í báti sínum.

### Toppleiðsla

Vit spurdu Finn Sivertsen, hvat útbúgvingin "top governance" stendur fyri?

- Orðið merkir toppleiðsla. Hetta er ein eitt-ára toppleiðaraútbúgving við atliti bæði til nevnd og stjórn. Undirvíst verður eitt nú í løgfrøði, fígging, váðastýring, leiðsluhættum, leiðsluamboðum, strategiskari menning og tøkniligari nýmenning.

Hann sigur, at flestu undirvísarar eru gestafyrilestrarhaldarar.

Og tað er ikki hvør sum helst, ið tekur sær av frálæruni.

- Hetta eru kendir professarar og vinnulívsfólk. Millum best kendu eru danski vinnulívsmaðurin, Asger Aamund og Steen Hildebrandt, professari.



*Finnur Sivertsen, búskaparfrøðingur, fær prógv í "toppleiðslu" á Business-Institute*

### Eftirútbúgving

Hvat fær so ein føroyskan búskaparfrøðing at fara niður til Aalborg at taka eina slíka leiðsluútbúgving?

- Hetta er ikki nakað tilvitað, sigur Finnur Sivertsen, sum frammanundan hevur eina 12 ára gamla universitetsútbúgving innan vinnubúskap og vinnuløgfrøði.

Hann sigur, at tá hann sá eina lýsing um útbúgvingina í Børsen, helt hann, at hetta var eitt gott høvi at vitja aftur á kendar leiðir í Aalborg.

- Eg sá hetta eisini sum ein góðan møguleika at dagføra meg við einari praktiskari eftirútbúgving, sigur hann.

Finnur vísir á, at undirvísingin á Aalborg Business-Institute er á høgum støði, og er ætlað toppleiðarum og ráðgevum í donskum vinnulívi.

- Men dentur verður lagdur á at arbeiða við praktiskum verkætlanum, soleiðis at vitanin kemur til høldar í okkara dagliga virksemi. Serligur dentur er lagdur á at menna feløgini og leggja strategiskar ætlanir og at arbeiða við nýggjari amboðum innan leiðslustýring, sigur hann.

### Eingi landamørk

Vit fregnaðust eisini, um Finnur Sivertsen heldur, at ein slík "toppleiðaraútbúgving" kann brúkast í Føroyum.

- Eg havi ikki hugsað so nógv um handan spurningin, tí útbúgvingin, eg nú havi tikið, kennir eingi landamørk. Vitan er góður førningur, og tað er fínt, um eg kann "formidla" vitanina víðari á ein ella annan hátt.

Finnur heldur, at hann umvegis sín portal hevur ein frálíkan møguleika at geva nakað av hesi vitan víðari til størsta partin av føroyska vinnulívinum.

- Eg haldi, at fakliga støðið hjá føroyskum leiðslum og nevndum er á góðari leið samanborið við støðuna í okkara grannalondum, sigur hann.

### At tilføra vitan

Hann vísir á, at altjóða kappingin tvingar leiðslurnar til nýhugsan, og tí kemur hugtakið "broytingarleiðsla" at spæla ein avgerandi leiklut, hvussu leiðslurnar megna at loysa komandi avbjóðingar.

- Eg haldi, at hóast fakliga